# Leys størv í Tórshavnar kommunu

www.torshavn.fo

## LEIÐARI TIL BÝLINGSHÚS

**Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara til Býlingshúsið í Maritugøtu at arbeiða 40 tímar um vikuna, at byrja 1. mars 2010.**

Stovnurin er skipaður við eini vøggustovu við 13 børnum og tveimum barnagarðsstovum við 17 børnum. Stovnurin er rættiliga nýggjur og rúmsáttur. Og eru øll námsfrøðiligu størvini sett uttan eitt.

**VIT BJÓÐA**
- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum, og har spælið fyllir nógv
- møguleika at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving
- tú verður partur av einum netbólki, sum kommunan skipar fyri millum dagstovnaleiðararnar

**VIT VÆNTA AT TÚ**
- ert útbúgvin pedagogur og hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi á einum stovni, ið rúmar bæði vøggustovu og barnagarðsbørnum
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi
- sær møguleikar framum vansar
- hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur lætt við at orða teg munnliga og skrivliga á føroyskum
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði

**SETANARVIÐURSKIFTI**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**UMSÓKN**
Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir skal vera hjá Tórshavnar kommunu, Vaglið, postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 8. februar 2010.

**NÆRRI KUNNING**
Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóra, tlf. 302010, ella Katrina Petersen, deildarleiðara, tlf. 302010/214032, ella við at hyggja inn á www.maritugota.fo.

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER LANDSINS STØRSTA KOMMUNA.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja sera stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava eina nútímans og opnan leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta vit somuleiðis innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA







# SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir skrivstovufólki til telefonmóttøkuna at byrja skjótast gjørligt. Talan er um parttíðarstarv frá kl. 10 til kl. 14 hvønn dag.

**UPPGÁVAN**
Uppgávan fevnir m.a. um:
- Ábyrgd av telefonmóttøkuni
- Avgreiðslu av viðskiftafólki í telefonini
- Hjálp við hóskandi uppgávum frá øðrum deildum
- Aðrar fyrifallandi uppgávur

**FØRLEIKAKRØV**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni, er fyrikomandi og dugir væl at samskifta við onnur. Tað er ein treyt, at ein hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**SETANARTREYTIR**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Innlendismálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Búgva Apol, deildarleiðara, á telefon 350 428. Umsóknir við avritum av møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi áðrenn **25. januar 2010.**

*Akstovan er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 21 fólk.*

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

SENDISTOVAN